# Føroya Banki – ein nýmótans klassikari á veg framá

Føroysk lesandi í Danmark eru kræsnir kundar, tí tey eru von við høgt tænastustøði í donsku peningastovnunum, og tá tey flyta heim, seta tey tí høg krøv til sín banka. Somuleiðis krevja føroyingar, ið flyta heimaftur, at fáa spennandi avbjóðingar og gott rásarúm til at brúka sínar førleikar í eini nútímans fyritøku.

Í framløgu á JobMatch fer Johnny í Grótinum, deildarleiðari í Føroya Banka, at greiða frá, hvussu og hví Føroya Banki eggjar føroyingum at flyta heimaftur til Føroya. Somuleiðis fer Johnny at greiða frá teimum mongu broytingum, ið hava verið í bankanum seinnu árini.



*Johnny í Grótinum, deildarleiðari*

Síðan Føroya Banki fyri trimum árum síðan orðaði eina nýggja vakstrarstrategi, er nógv hent í bankanum. Fleiri nýggj virkisøkir eru sjósett, har húsameklarafelagið Skyn við sínum høga góðskustøði kanska er tað átakið, sum hevur størstan týdning fyri føroyingar, ið flyta heim.

Føroya Banki varð í fjør skrásettur á keypsskálunum í Keypmannahavn og Reykjavík og virkar nú samsvarandi teimum reglum, ið galda fyri børsskrásettar fyritøkur. Altjóða samskifti bankans er nógv ment, og enskt er nú javnsett við føroyskt í samskiftinum mótvegis børsunum og teimum 15.000 partaeigarunum hjá bankanum.

Nýggi samleikin hjá bankanum er gjølla umhugsaður. Hann vísir ein númótans klassikara á veg framá. Grundleggkandi virði bankans eru dugnasemi, eldhugi og framsøkni, og alt, sum bankin ger, og øll marknaðarføring bankans byggir á hesi virði.

Við 100 ára royndum sum banki hjá privatkundum og vinnukundum hevur Føroya Banki sterkt kjølfesti í føroyska samfelagnum. Bankin kennir tað sum sína samfelagsskyldu at skapa góðar umstøður fyri fólk í Føroyum, og bankin virka samstundis fyri, at føroyska samfelagið allatíðina verður altjóðagjørt.

Á JobMatch fara tey vitjandi at kunna fáa eitt gott fakligt og íblásandi prát við umboð fyri Føroya Banka

# Netverk tiltak

Fríggjakvøldið 26. september klokkan 20.00 verður skipað fyri einum Netverkstiltaki.

Á netverkstiltakinum verður ymiskt spennandi á skránni.

Bogi Eliasen greiður frá høvuðsniðurstøðunum í kanningunum um føroyskar útisetar.

Suni Poulsen, sálarfrøðingur og partnari í Marketminds greiður frá fokusbólkakanning um hví nógvri útisetar ikki koma aftur til Føroya.

Tríggir føroyingar úr vinnu og fyriseting at greinða frá, um hví grasið er grønari í Føroyum - hetta skilt á tann hátt, at tey fara at bera fram sína áskoðan um fyrimunirnar við at virka og liva í Føroyum. Tey eru:

- Marjun Hanusardóttir, Stjóri á Løgmansskrivstovuni
- Hákun Steingrímsson, Stjóri á Formula.fo
- Christian Nagata, Stjóri á Nema

Harafturat verður eisini politisk kjak um framtíðarsamfelagið Føroyar, um hvussu Føroyar kunnu gerast meira áhugaverdar fyri útisetar at flyta heimaftur til. Í Kjakinum luttaka teir føroysku fólkatingslimirnir, umframt at fundarluttakarar kunnu siga sína hugsan um hetta evni.

Annita á Fríðriksmørk, Fólkatingslimur fyri Tjóðveldisflokkin

Edmund Joensen, Fólkatingslimur fyri Sambandsflokkin

Føroyskur tónleikur verður eisini á skránni hetta kvøldið, har Lena & Niclas, Gurið Hansdóttir og Maria Guttesen og Kári P fara at spæla..

Tilltakið verður fyriskipað saman við Føroyahúsinum, og luttøka á netverkstiltakinum verður ókeypis!



# Nærverkið á JobMatch í Keypmannahavn

Á JobMatch-stevnuni, sum verður á Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn fríggjadagin 26. og leygardagin 27. september 2008, fer Nærverkið at dyrgja eftir nýggjum starvsfólkum.

Vit hava ein bás á framsýningini, har høvi verður at hitta starvsfólk frá ymisku deildunum, og kl. 13.00 báðar dagarnar verður áhugaverd framløga um nógvu ymisku starvsmøguleikarnar í Nærverkinum.

Nærverkið fer í komandi árum at hava tørv á nógvum starvsfólkum, og vónandi kann JobMatch vekja áhugan hjá útisetum og danskarum við røttu útbúgvingunum at koma heimaftur á klettarnar.

Vit gleða okkum og vóna, at nógv vitja okkara bás hesar báðar dagarnar.

## Sendimaður setir JobMatch



*Herálvur Joensen, sendimaður*

Herálvur Joensen, sendimaður Føroya í Keypmannahavn, fer at seta JobMatch starvstevnuna fríggjamorgunin 26. september kl. 9.40.

JobMatch fer fram á Norðurbryggjuni, sum er júst sami bygningur, sum Sendistova Føroya heldur til í. Í samband við fyrireikingarnar av JobMatch hevur verið tætt og gott samstarv við starvsfólkini á Sendistovuni.

Leygarkvøldið 27. september skipar Sendistova Føroyar fyri móttøku fyri innbodnum.

## Framløga við Tórshavnar Kommunu

Tórshavnar Kommuna hevur eina framløgu um kommununa á JobMatch. Fyrstu parturin av framløguni fer at samanbera fíggjarliga viðurskifti í Tórshavnar Kommunu við viðurskiftini í Føroyum sum heild og við Danmark. Hugt verður at skattligum viðurskiftum, barnarstuðli og øðrum gjøldum og stuðli. Framløgan fer at vísa dømir um ymiskar familjur so sum, støk, familja við tveimum børnum og stakir uppihaldarar, sum búgva í ávikavist Danmark og Tórshavn, og hvat munurin er á tøku inntøkuni hjá hesum.

Annar partur snýr seg tilboð og tænastur í Tórshavnar Kommunu. Nógvar betringar í tilboðum og tænastum til familjur og einstaklingar eru hendar seinnu árini, og Tórshavnar Kommuna fer í framløguni at vísa á nøkur av hesum viðurskiftum.